## DAGSINS MEINING

# Eingin oljuboring í ár

Tað kom ikki sum nøkur bumba – tíðindini um, at eingin oljuboring verður á landgrunninum í ár. Tað hevur leingi ligið í kortunum – eftir tær tríggjar boringarnar í fjør – at helst fór Agip at útseta sína boring í eitt ár – fyri at gera sítt heimaarbeiði uppaftur betri, nú vónirnar til at finna olju í somu løgum sum tey í bretskum øki, vórðu av ongum.

Gitt hevur verið, at Agip fór at biðja um útseting, nú jarðfrøðiligu modellini, sum liggja til grund fyri boringunum, skulu gerast heilt av nýggjum, og nú oljan, sum varð funnin, liggur nógv djúpri enn roknað varð við. Eisini hini oljufeløgini, sum hava bundið seg til at bora fleiri enn ein brunn, hava sagt frá, at teirra komandi boringar verða útsettar helst til 2004.

Nú kann so verða spurt, um hetta er eitt afturstig fyri leitingina við Føroyar! Oljumálaráðharrin heldur ikki. Og tað hevur hann helst eisini rætt í. Betur er at gera heimaarbeiðið betur, so møguleikin fyri at raka rætt fyrstu ferð og kanska einastu ferð, er so stórur sum tilber. Tað er skilligt, at tá øll oljufeløgini við teirra mongu serfrøðingum verða heilt tikin á bóli, tí teir hava ikki mett rætt, so má alt endurskoðast. Roknað hevur alla tíðina verið við, at olja fór at verða funnin í somu løgum sum teimum, har olja í dag verður framleidd í bretskum øki skamt frá markinum. Í teimum báðum feltunum Foinaven og Schiehallion. Men tað skuldi vísa seg, at hvørki í boringunum hjá Statoil ella BP var nøkur olja at finna, bert einstøk spor, og í brunninum hjá Amerada Hess varð ikki komið fram á nevniverdugar nøgdir av olju, fyrr enn borað varð nógv djúpri enn ætlað tvs. í løgum, har eingin ella fáur hevði hugsað, at oljan var at finna.

Tað er greitt, at oljutilgongdin hevur fingið eitt skot fyri bógvin. Tó so at bjartskygni helst hevur verið í so stórt og órealistiskt. Tí hyggja vit at royndunum aðrastaðni, so er tað heilt náttúrligt, at olja verður ikki funnin eftir bert heilt fáar boringar. Vestan fyri Hetland vórðu t.d. boraðir meira enn 70 brunnar, áðrenn ítøkiligt úrslit kom burturúr. Í Noregi vórðu boraðir fleiri enn 30 brunnar, áðrenn fund varð gjørt. Í Føroyum eru bert boraðir tríggir brunnar. Og í tí eina er møguleiki fyri einum veruligum fundi. So eftir hesum úrslitinum at døma eiga vit at vera nøgd. Men vit mugu samtíðis hava tol.

Tað er sum landsstýrismaðurin sigur: vit mugu hava tol og vit mugu brúka ta tíð hetta tekur. Heldur bíða og raka rætt enn at skunda sær og raka við síðuna av. Tað er sjálvandi stórt spell fyri veitararnar, sum hava gjørt seg út. Hinvegin er hetta ein partur av veruleikanum. At vinnan her heima kortini ikki enn hevur gjørt seg út bara til at virka burturav í hesi vinnu er so eisini gott, og er nettup eitt dømi um tað skilagóða í at hava eina liðiliga vinnu. Tað er ikki fyrr enn lønandi oljufelt eru funnin og avgerð er tikin um at byggja út, at vinnulívið á landi burturav eigur at fara inn í hesa vinnu. Nú mugu vit so seta okkara álit til, at feløgini miðvíst halda fram við sínum arbeiði. At tey ikki spæla myrkaspæl og ætla sær so spakuliga at sleppa burtur úr økinum og forpliktilsunum. Í so máta kunnu brunnar hinumegin markið fáa stóran týdning fyri okkum eisini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vinnurekandi uttan sjúkratrygging

**Leila Hjørleivsdóttir á Lofti**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*



Dagpeningalógin broyttist 8 mei 2001. Hetta hevði við sær, at 121 persónar knappliga vóru uttan nakran sjúkratryggingarmøguleika.

Ònøgdin hesum viðvíkjandi endaði aftur í tinginum. Eftirfylgjandi hendi tað, at nøkur komu aftur í dagpeningaskipanina, meðan restin enn bíðar eftir endaligum kunngerðum og reglum um ,hvussu lógin sum heild kann umsitast.

Ein sera ótrygg støða hjá smáum virkjum og sjálvstøðugum vinnurekandi.

Tí mugu møguleikarnir fyri alternativum sjúkratryggingum kannast.

Tryggingarfeløgini bæði, ella eitt nýtt triðja, er ein upplagdur møguleiki.

Tað eigur og skal bera til, uttan mun til um inntøkan er av slagnum A ella B.

Hesum vil fólkaflokkurin stríðast fyri.

Sí meira á Folkaflokkurin.fo

# Nú valdi Jóannes Eidesgaard aftur Loysing fram um Samríki

**Kaj Leo Johannesen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Í Dimmalætting og í Sosialinum tann 17. apríl skrivar formaður Javnaðarfloksins positivt um Jákup Mortensen, sáli og Flemming Mikkelsen, løgtingslim. Men annars fer hann illa við restini av Sambandsflokkinum.

Trupult er at síggja nakað positivt endamál við hasum álopinum. Men er endamálið at leggja sjógv millum samríkisflokkarnar í Suðuroynni, so hevur maðurin gjørt eina dáragerð fyri allar suðuroyingar, og tá hevur hann eisini hjálpt Tjóðveldisflokkinum. Hann hevur tá enn einaferð valt loysingarleiðina fram um samríkisleiðina.

# Hvussu sinnaður er Javnaðarflokkurin veruliga fyri Ríkisfelagskapinum

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðruoy*



**- og evt. samgongu við Sambandsflokkin???**

Skal ein ganga út frá lesarabrævi Jóannesar í Sosialinum ídag tann 17. apríl, so sær ikki gott út við við møguligum samstarvi millum Sambandið og Javnaðin í eini komandi samgongu, vit mangla bara teir svørtu veingirnar.

Tað er eyðsæð fyri einhvønn, at Javnaðarflokkurin hevur broytt kós og er komin meir á sambandsleið, vit sum eru sambandsmenn kunnu bert gleðast um hetta. MEN, MEN tann brennandi spurningurin er:

- Er hetta einans "spæl fyri gallarínum" inntil 30. apríl er farin afturum ella??
- Er hetta kanska ein máti at royna at flyta nakrar sambandsstemmur til javnaðin??
- Tá Jóannes Eidesgaard eftir at samgongurskjalið var skrivað, segði við fjølmiðlarnar, at hann kundi taka undir við øllum sum stóð á síðu 1 í samgonguskajlinum - ER HANN SO IKKI EISINI EIN AV LOYSINGARMONNUNUM , SKAL TAÐ KANSKA SKILJAST ANNARLEIÐIS, ELLA????
- Er Sambands-/Javnaðarsamgongan, sum burdi verið í eygsjón, kanska ikki realistisk???

Tíðin vil vísa, hvar vit hava Javnaðarflokkin og formann hansara í einari komandi samgongu.

# Eg skilji púrt einki

**Ólavur í Beiti, rithøvundur**



Eg skilji líka lítið politikkin sum meg sjálvan!

Tá ið eg taki synd í mær sjálvum, eri eg javnaðarmaður!
Tá ið eg eri linur, eri eg sambandsmaður!
Tá ið eg droymi, eri eg sjálvstýrismaður!
Tá ið eg eri illur, eri eg tjóðveldismaður!
Tá ið eg eri tystur, eri eg miðflokkamaður!
Tá ið eg eri svangur, eri eg fólkafloksmaður!


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støða:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VALGREINAR

# At nýta vit og skil

**Henry Jarnskor**



Dreymar og ynskir hava vit øll – og tað eiga vit at hava. Hetta er tekin uppá eina sunna sál, og gevur okkum orku og megi at virka í ofta buldruta gerandisdegnum.

Men takk og lov – duga vit at skilja ímillum dreym og veruleika. Barnalærdómur okkara er ein tíðandi partur av kjølfestinum (barlastini) á lívsleið okkara. Eitt tað fyrsta vit lærdu var, – at hugsa okkum um, at nýta vit og skil, soleiðis at vit ikki av egnum gáloysni endaðu í óføri.

Eg loyvi mær at tvíhalda um, at uppvaksandi ættarliðið er minst líka skilagott sum vit eldru, ja – í ávísum førum nógv skilabetri.

Men eins og fyrr eru nakrir droymarar okkara millum. Teir eru sanniliga vælkomnir, og vit eiga at stuðla teimum at virka í dreymaverð teirra, soleiðis at teir kunna geva okkum stórar skaldsøgur, yrkingar, málningar ella hvat nú dreymar kunna framleiða, men at lova droymarum framat at mynda samfelagið er skilaleyst.

Eg havi somikið álit á føroyingum, at eg við vissu kann siga, at einki dreymafullveldi verður, so leingi sum vit og skil ræður her á landi.

Latið droymaran droyma, og latum okkum arbeiða konstruktivt við at betra um livilíkindini og framtíðina hjá lønmótakaranum og teimum minni mentu.

Tað sum er gott, fara vit ikki at kasta fyri bakka. Vælferðin og trivnaðurin her í Føroyum er ikki komin av sær sjálvum. Stríðið hevur verið tógvið og drúgvt. Rættindi eru vunnin, javnaður er ikki; – og so leingi sum órættur og mismunur valdar, er arbeiðssetningur javnaðarfloksins óbroyttur. Vit hava uppskriftina, tilfarið og viljan til at fara til verka, og virka fyri størri avgerarætti í øllum málum, ið hava við føroyingin í Føroyum at gera.

Føroyingurin í Føroyum finna vit í Føroyum. Javnaðarfólk eiga vit at finna í Javnaðarflokkinum, men tað eru løtur, har eg eri í iva, tí eg síggi, at hjá fleiri sokallaðum javnaðarmonnum er hugsjónarlogin sløknaður, og í staðin er komin tráðanin eftir persónligum løtuvinningi. Politikkur er annað enn taktiskt spæl og vakrar myndir. Politikkur er fyrst og fremst trúfesti. Trúfesti mótvegis hugsjónini og trúfesti ímóti veljaranum. Hugsjónina hava vit, – men við trúfestinum hevur tað verið so sum so. Høvdu vit havt prógvað viljan til trúfestið, hevði flokkurin verið nógv tann største á tingi í dag, so einkult er tað.

Eg fari at pástanda, at nógvir av veljarum flokksins velja Javnaðarflokkin, tí teir ikki hava annan møguleika, ella sum danskarin sigur »i mangel af bedre«.

Ynskja tit framhaldandi at halda fast við hesa støðu, er einasta vón veljarans hon, at hann fær eitt alternativ – og tá vendist ikki aftur. Minnist til røturnar – uttan rót – eingin gróður.

Søgan hevur víst okkum ferð eftir ferð, at hetta at venda reyv og fara í sjálvdrátt byggir einki upp og skapar ongan framburð – heldur tvørturímóti. At klára seg sjálvan og at hava sítt egna, hevur einki við manglandi samstarvsvilja ella – evnir at gera. Gerabýti hevur frá fyrndartíð verið millum manna, og hvat er meira nattúrligt enn at slíkt býtið eisini fer fram millum bygdir, landslutir og lond. Vit síggja tað jú dagliga í verki, og eigur hetta at stuðlast og útbyggjast heldur enn at avtakast, tí at droymarar okkara millum einki hava at gera í einum gerabýti.

Nei – sum skilafólk fara vit nú, ikki bara at stinga fingurin í jørðina og lukta hvar vit eru, men vit fara at takað hakan, spakan og kvíslina fram. Um neyðugt senda vit boð eftir gravkúnni, so heimldiga trøðin kann verða drena, velt og gróðursett, við skynsemi og kærleika, so komandi ættarlið kann fáa gleði og gagn av ávøkstrinum.

**Eg góðtaki ikki eitt samfelag**

har stættamunur er ein sjálvfylgja,
har lógir og reglugerðir eru ómoralskar,
har ognir føroya fólks verða givnar burtur,
har tað er ein økonomiskur fyrimunur ikki at vera giftur,
har inntøkan ikki avgerð hvussu nógvur skatturin er,
har reallønin hjá vanligu lønmóttakaranum lækkar,
har tey óhjálpnu eru gloymd og burturgoymd,
har sjálvvirðið verður tikið frá teimum gomlu,
har stórur partur av teimum ungu verður stavnsbundin,
har hin sterkasti ræður.

EG góðtakið tað ikki – gera TIT tað???

Lati okkum fáa ein sterkan Javnaðarflokk inn á ting.

# Nýggjur barnapolitikkur

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðarfloksins*



Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at barnsburðarfarloyvið verður longt upp í eitt ár. Pápin skal hava ávísan part av tíðini.

Vit vilja arbeiða fyri, at øll børn fáa mennandi stovnspláss í øllum kommunum.

Vit vilja virka fyri, at fleiri pedagogar verða útbúnir. Tað skal verða ein sjálvfylgja, at útbúnir pedagogar eru um børnini og geva teimum mennandi avbjóðingar í barnagørðum og vøggustovum. Systkinaavsláttur skal veitast familjum við fleiri børnum.

Vit vilja betra um umstøðurnar hjá barnafamiljum at vera virknar á arbeiðsmarknaðinum.

Farloyvisskipan skal setast í verk, so foreldur í avmarkaðum tíðarskeiði kunnu fara úr arbeiði ella niður í arbeiðstíð við lutvísum endurgjaldi.

Vilt tú hava ein nýggjan barnapolitikk, so vel Javnaðarflokkin og set X við lista C.
www.lindenskov.com

# Set tín X við lista C, ella eitt av valevnunum á lista C 30. apríl

**Joan Ziskason**
*valevnið hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy*



Javnaðarflokkurin vil inn á ting fyri m.a. at bøta um viðurskiftini hjá hesum:

- Tey eldru
- Tey ungu
- Fólk við breki
- Familjan
- Verkafókið

Vit eru einasti flokkur, sum hevur ítøkiligar ætlanir á hesum økjum, og sum hevur gjørt fíggjarligar útrokningar.

# Valið tann 30/4 – Samband ella hjúnaðarskilnaður

**Katrin Gulklett**

Fyrst vil eg takk Virgar T. Dalsgaard fyri, at hann hevur kunnað nútíðina um, hvat hendi á politiska vígvøllinum, meðan Heðin Brú sáli livdi.

Hetta er ógvuliga væl skrivað og vísir á, at skrivifrælsið og orðið, tá sum nú, ikki er frítt í Føroyum – meðan Føroyar skal verða »frítt« – siga kotamenn og endurtaka seg sjálvan eina ferð enn.

Í ár 2002 eiga vit at hava talu- og skrivifrælsi, uttan at fólk halda og trúgva um nakað so álvarsligt sum fullveldi kontra samband við Danmark.

Tað vísir seg, at søgan endurtekur seg, bert við 50 ára millumbili. Ein »frelsari« tá, – sum nú.

Sama framferð, sum Virgar so væl greiðir frá, verður framd í Føroyum í dag. Tað eru fá, sum ditta sær at siga sína meining hart, enn minni tora tey at skriva og seta sítt navn undir, men goyma seg undir dulnevni.

Vit, sum búgva í Danmark, kunnu bara fella okkara orð á pappírið. Búðu vit í Føroyum, kundu vit blanda okkum beinleiðis í politisku støðuna, tí vit hava stóran áhuga fyri okkara kæru har heima og framtíð føroyinga yvirhøvur.

**Roknistykkið hjá Hoydal**

Tað búgva uml. 48.000 fólk í føroyum, harav eru nógv børn og fleiri gomul. Restin, tað arbeiðsføra fólkið, skal yvir eitt stutt áramál gjalda 1,3 milliardir meira í skatti á ein ella annan hátt.

Hvussu í allari víðu verð skal hetta roknistykkið kunna hanga saman?

Skulu tey gomlu flyta inn til børnini ella eta tara?

Skulu tey aftur at skera torv, tí olja er ov dýr?

**Blokkurin**

Um vit nú ongantíð høvdu fingið blokkin, hvussu var so vorðið hjá t.d. pensiónistunum í dag?

Jú, so hevði pensiónin verið prístalsregulerað sum alt annað t.d. sjúkrahús, skúlar v.m. Øll høvdu fingið tað, sum tey høvdu krav uppá at fáa.

Sum nú er, er ein stórur partur av pensiónini stolin frá teimum eldru.

Hetta helst til at fíggja ta stóru lønarhækkanina, sum politikararnir góvu sær sjálvum síðsta ár. Fyri ikki at gloyma tryggjanina av teirra egnu pensión, tá teir rúka út til komandi val.

Hvør króna varð oyramerkt, áðrenn blokkurin stakk sítt høvd fram undan kavi.

Blokkurin kundi staðið við sítt trúvirði, um teir stýrandi høvdu dugað at stýra við skili og ikki við hatri.

Eg vil samstundis nýta høvi at takka Aksel Krogh pensiónisti fyri, at hann áhaldandi skrivar um støðuna hjá pensiónistum í Føroyum.

Tað er gott, at tann hvíti bonkurin kann tola at hoyra um, at tit blíva so álvarsliga snýttir fyri ta pensión, sum tit hava stríðst eitt heilt lív fyri at nýta ágóðan av.

En pensión skal prístalsregulerast so sum alt annað hvørt ár. Og eg kann bara geva Aksel rætt í, at tit eru drigin við nøsini í fleiri ár nú.

**Fjølmiðlarnir SvF og ÚF**

Tað, sum vekur stóran anga hjá mær er, at menn sum Leivur Hansen, sum arbeiðir í SvF og Jógvan Arge, sum arbeiðir í ÚF, eru trúfastir tjóðveldismenn.

Teir skriva í bløðini, stýra øllum fjølmiðlum í Føroyum og kunna enntá syrgja fyri, at Hoydal himself er við í øllum, sum verður sent.

Teir kunnu enntá, – við ella uttan løn – syrgja fyri, at hinir ikki fáa ov langa tíð at tosa í; verða forðaðir í at tosa liðugt av Hoydal, meðan skæðugákurin Hoydal hevur óavmarkaða tíð og ofta heldur einaveldisrøður bæði í útvarpi og sjónvarpi.

Hesir menn eru »inhabilir« til at røkja síni størv, tí teir bera sólbrillir alla tíðina – eru Hoydalsfrelstir.

Teir síggja ikki, at tað er ein nýggjur dagur í morgin og eitt nýtt ár næsta ár.

Vit, sum búgva í fríum landi og hava loyvi at hava eina aðra meining enn aðalin í Føroyum, so sum: »Patursson, Hoydal og Vang«, hugsa okkara.

Tað er óhugnaligt, at tann aðalin, sum kann velta, fiska og drepa seyð, skal avgera lagnu fiskimanna og teirra ættarliði við.

Eg vil enda hetta brævið frá mínum friðarbýli í Danmark við at siga at: »Samband er gott, men at ein skilnaður millum hjún er ringt, bæði fyri tey vaksnu – men ringast fyri børnini."

Ein góð framtíð fyri okkara børn borgar fyri eini liviberandi framtíð fyri okkum, sum nú eru foreldur, tá vit verða gomul.

Mín áheitan skal tí vera til alt Føroya fólk antin at velja Javnaðarflokkin ella Sambandsflokkin inn á ting – helst báðar flokkar.

Alt annað vil vera at grava sína egnu grøv og bumba Føroyar yvir í triðja heim, har órættvísi, fátækradømi og hungur fer at verða veruleiki.